# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*12. august fingu Elin og Sámal Søsensen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.*



*9.9.07 fingu Teitur og Ranja hendan fitta beiggjan. Hann er 54 cm langur og vigar 4200 gr. Foreldrini eru Janie Waag Høgnesen og Brynjálvur Petersen úr Kvívík*



*8. september fekk Sámuel eina lítlasystir, sum eitur Sólrun Maria Grímsdóttir. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr. Foreldrini eru Lillian og Grímur Poulsen, Ljósá*



*14. mai fingu Mette Skaarup Pedersen og Heðin Magnussen eina dóttur. Hon varð fødd á Herlev sjúkrahúsi. 12. august varð hon doypt í Herlev kirkju. Hon eitur Ella Skaarup Magnussen*



*2. september fingu Mari Hamará og Dánjal Jákup Wiberg Holm, Odense, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3702 gr.*

29. august fingu Hervør og Peter Skála Mortensen, Rødekro, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

1. september fingu Hjørdis og Jóhan Hávarsá, Norðoyri, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

3. september fingu Ida Nielsen og Gardar O. Justinussen, Gentofte, eina dóttur. Hon vigaði 3700 gr. og var 52 cm long.

4. september fingu Mariann Nielsen og Jens Mørkøre, Eiði, eina dóttur. Hon var 44 cm. long og vigaði 1990 gr.

4. september fingu Vanda Rasmussen og Hans Poulsen í Randers ein son, sum fekk navnið Jóhannis. Hann vigaði 3400g og var 50 cm langur.

5. september fingu Vivian Højgaard og Suni Jacobsen, Argir, eina dóttur. Hon var 43 cm. long og vigaði 1850 gr.

5. september fingu Marianna Poulsen og Zacharias Hammer, Tórshavn, ein son. Hann var 43 cm. langur og vigaði 2040 gr.

7. september fingu Nanna og Magni Jacobsen, Skála, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3650 gr.

7. september fingu Mirjam og Jákup Mikkelsen Esbjerg ein son. Hann vigaði 3950 gr og var 54 cm langur.

7. september fingu Susan og Finn Larsen, Svendborg, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3725 gr.

8. september fingu Gunnvá Gray og Ransin Napoleon Djurhuus, tvíburar - gentur. Tann eina var 45 cm. long og vigaði 1950 og hin var 46 cm. long og vigaði 2300 gr.

9. september fingu Hildigerð Djurhuus og Richard Hentze, Sandur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

7. september fingu Súsanna Eikhólm og Rúni Kruse, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

# Ferð við Ættarbandinum á Sandi

**Leygardagin skipaði Ættarbandið – felagið hjá teimum, ið fáast við ættargransking – fyri útferð á Sandi við fyrilestri um fólkateljingina í 1801**



*Tað var fullsett í Virkinum á Sandi leygardagin - og har vóru fólk úr øllum landinum*

*Mynd: Oskar Oskarsson*

Leygardagin 8. september legði Ættarbandið leiðina heim á Sand. Ættarband er felag hjá teimum, sum fáast við at greina ættarviðurskifti, og hesi fólk teljast úr flestum bygdum kring í landinum.

Hesaferð var Ólavur Clementsen frásøgumaður. Evnið hann hevði valt at tala um var Heimasands bygd við fólkateljingini í 1801 sum grundarlag.

Fullsett var í Virkinum á Sandi kl 15 leygardagin, og væl skorin fyri tungubandinum legði Ólavur fyri, greiður og ikki langrøkin. Tey útvið 100, ið lurtaðu, fingu okkurt at hugsa um hendan tíman, hann røddi.

Síðan varð farið oman í kirkjuna, sera hugnalig og væl er frágingin, nú hon er ístandsett.

Listasavnið hjá Sofusi Olsen var sjálvsagt vitjað, forvitnisligt er at koma innar í hetta sera snotiliga listasavn, og mangt forvitnisligt er at síggja. Fornminnissavnið í Koytu er ikki minni áhugaligt og so var farið aftur í bussarnar til Skálavíkar, har borðreitt var til døgverða.

Her var Palli Dalsgaard frásøgumaður. Hann talaði um heimbygd sína við denti á frægu mentunarmonnum, bygdin hevur átt. Hann gav eina sera livandi og forvitnisliga lýsing av Heðini Brú, serliga.

Palli beyð nú fólkinum at koma niðan í kirkjuna. Tað var ikki minni hugtakandi løta at hoyra Palla siga frá, og uppímillum sat Eyðun við urguna - hann hevur verið urguleikari í Skálavík í 25 ár, til tey nú búgva á Sandi.

Skálavíkar kirkja fekk brytta útsjónd, eftir at hon nú er klødd við timbri, vakurt handverk. So er at nevna, at altartalvan er elsta í landinum frá miðskeiðis í 1600.

Ættarbandið er virkið felag og hevur stevnu, samkomu ymsastaðir í landinum á hvørjum ári og hevur tá fróðarfólk at siga frá forvitnisligum úr søgu.



*Ólavur Clementsen helt fyrilestur við støði í fólkateljingini í 1801*

*Mynd: Oskar Oskarsson*

Tey, ið skipa nevndi í Ættarbandinum eru: Maria Jacobsen, forkvinna, Glyvrar, Elin Midjord, næstforkvinna, Tórshavn, Jóna Lindenskov, skrivari, Tórshavn, Katrin Mørkøre, kassameistari, Eiði og Abdrass F. Joensen, Tórshavn.

**50 ár**
15. september halda Elsa og Elmar Simonsen, Hvannasund 50 ára føðingardag. Opið hús verður frá kl. 18.00 í Róðrarneystinum í Árnafirði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ár**
14. september fyllir Martin Nielsen, Klaksvík, 75 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum Gillagøta 14 í Hoyvík frá kl. 18.00.

**80 ár**
Leygardagin 15. sept. verður Elsa í Holusteini á Glyvrum 80 ár. Dagurin verður hildin í tilhaldsstaðnum Fløganum á frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur.**
Leygardagin 15. september fyllir Anna Malena Christiansen, í Havn, vanliga nevnd Annimalla, 90 ár. Tey, sum vilja heilsa uppá Annimallu, eru hjartaliga vælkomin í heim hennara frá kl. 12 á Mýrisnípuvegi 1B.

**Brúdleyp**
Leygardagin 22-9/2007 giftast Bjørg Ellingsgaard, við Ljósá og Dánial í Skemmuni, frá Runavík. Vígslan verður í Berøa kl. 12.00 og døðguri verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00. Vælkomst verður frá kl. 20.30 við smyrjibreyði, kaffi og kakum. Tað hevði glett okkum at sæð familju, vinir og kenningar.

Leygardagin 22. september kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Anna Sólvá Olsen av Tvøroyri og Rúni Heðinson Johannesen, Tórshavn. Veitslan verður fyri innboðin á Hotel Føroyum.